# Føroyar halda tørn



Súni Olsen og hinir á føroyska landsliðnum halda tørn, tí Føroyar verða framvegis styrkismettar sum nummar 132 í heiminum av altjóða fótbóltssamgonguni FIFA.

savnsmynd

**Grikkaland hevur gjørt størsta lopið á FIFA styrkislistanum, har helmingurin av hálvt hundrað teimum bestu tjóðunum er úr Europa**

FIFA STYRKISLISTIN
*Jóannes Hansen*

Í morgin fer landsliðið, sum fyri tað mesta er mannað av spælarum, ið av leiðsluni verða roknaðir at teljast millum teirra, sum í framtíðini skulu manna A-landsliðið, til Spania á venjingarlegu.

Í fyrradagin fingu føroyingar eina heilsu frá FIFA at hava við sær á ferðini suður á Iberisku hálvoynna. Føroyar eiga sambært altjóða styrkislistanum fyri februar 132. besta fótbóltslandsliðið í heiminum. FIFA hevur hvørki flutt Føroyar fram ella aftur á listanum síðani í januar. Somu tjóðirnar eru omanfyri og niðanfyri Føroyar, sum vóru á hesum plássum fyri einum mánað síðani. Etiopia er eitt pláss hægri á listanum enn Føroyar, og India er eitt pláss undir Føroyum.

Síðsti mánaðin hevur verið rættuliga friðarligur hvat landsdystum viðvíkur. Íalt hava tað seinasta mánaðin kring allan heimin verið spældir 78 a-landsdystir. Í 64 av førunum hevur talan verið um vinardystir, tólv hava verið undankappingardystir til HM, og í tveimum førum hevur talan verið um undankappingardystir til heimspartakappingar.

## Grikkaland stórt lop

Mest merkisverda broytingin á FIFA styrkislistanum er tann hjá Grikkalandi. Europeisku meistararnir eru lopnir fram á trettanda plássið, sum er fimm pláss hægri, enn Grikkaland var á fyri einum mánað síðani. Hetta er fremsta plássið, sum Grikkaland hevur rokkið, síðani FIFA í 1993 fyri fyrstu ferð kunngjørdi styrkislistan.

Høvuðsorsøkin til stóra grikska lopið er sjálvandi, at Hellas í summar vann EM endaspælið. Ein onnur orsøk er, at Grikkaland fyri stórari viku síðani vann HM undankappingardyst á heimavølli ímóti Danmark 2-1.

Danmark er dottið frá 13. og aftur á 15. plássið. Svøríki verður mett at eiga besta landsliðið í Norðurlondum. Sviar eru saman við Grikkalandi á 13. plássinum.

Tindurin á listanum er tann sami, sum hann leingi hevur verið. Brasilia, Frakland, Argentina, Kekkia og Spania eru framvegis á fimm teimum ovastu plássunum, og nú er Meksiko (+1) á sætta plássinum saman við Hollandi, sum frammanundan var einsamalt á hesum plássinum.

Listin boðar frá, at í miðal eru europeisku fótbóltstjóðirnar stinnari enn allar aðrar. Helmingurin av teimum hálvt hundrað fremstu eru úr Europa. England er nummar átta, Portugal nummar níggju og Italia er á tíggjunda plássinum, meðan USA er nummar ellivu og Írland, sum seinni í ár fer at spæla HM undankappingardyst í Føroyum, er á tólvta plássinum.

Noreg er nummar 35 (+1), Finnland nummar 38 (+5), Sveis nummar 49 (+2), Ísrael nummar 51 (-2), Ísland nummar 94 og Kypros verður mett at eiga 108. (+1) stinnasta landsliðið í heiminum.

## Dystaryvirlit

**Sunnudagur 20.02.05**
**Flogbóltur:**
**Meistaradeildin kvinnur:**

| | | |
|---|---|---|
| 14.00 | ÍF - KÍF | Kambsdalur |
| 15.00 | TB - Mjølnir | Trongisvágur |

**Meistaradeildin menn:**

| | | |
|---|---|---|
| 16.00 | SÍ - Fleyr | Sørvágur |
| 16.00 | ÍF - Fram | Kambsdalur |

SISERO 351800

# Mekanikari

**søkist til Shell á Frælsinum!**

Verkstaðið hjá Shell á Frælsinum søkir eftir mekanikara til alt mekaniskt arbeiði.

Tann ið settur verður fær eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við nógvum ymiskum uppgávum

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tann ið settur verður, er
- Útbúgvin mekanikari
- Hevur góðan røkjuskap
- Hevur góð samstarvsevni

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at ringja tel 217355/312112 til Geir Wardum støðleiðara

**Umsóknir**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir, skula sendast innan 1. mars 2005 til



Føroya Shell P/f
Viðarnes
FO-100 Tórshavn
Viðm.: Mekanikari

www.shell.fo

Hyundai Getz kosin "Årets Bestseller"

Millum 20 tey mest seldu bilmodellini í Danmark bleiv Hyundai Getz 1,3 vi 5 hur um valdur sum tann mest økonomiski bilurin at koyra í. Tað sæst á tænastusíðuni www.bilpriser.dk, sum eisini hevur kosið Hyundai Getz til "Årets Bestseller"

Prísir úr BERT
118.750,-
FÆST EISINI SUM DIESEL



FÆST NÚ EISINI SUM VAN
99.750,-
v/mvg

Sosialurin 341800

HONDA NOR BIL ŠKODA HYUNDAI

BOX 1070 · OYGGJARVEGUR · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 313707 · FAX 310855